# Tiltøk

**Havnar kirkja**
Mikukvøldið 1. des. kl. 20 verður kirkjuárið sungið inn í Havnar kirkju. 80 kórsangarar syngja fyri og Annfinnur Heinesen lesur trý stutt tekstbrot úr Nýggja Testamenti.

**Aftankvirra í Havnar kirkja**
verður fríggjakvøldið 3. des. kl. 21-23. Kl. 22 syngur Berghild Poulsen advents- og kvøldsálmar. Kl. 22.30 verður andakt

**Frelsunarherurin**
Mánakvøldið
kl. 19 Andakt á Mørkini.
Kl. 20.30 Streingjakórsvenjing Úlvar kl. 18. Skótar kl. 19.
Mikudag
Kl. 15 Bønarmøti
Kl. 19 Cellegruppa menn
Hóskvøldið
Kl. 20 Ungdómurin samlast
Kl. 20 Heimaforbundið
Sunnudagin
Kl. 11 Halgunarmøti v Jacobinu Heinesen og Jens Eli Albinus. Kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bøn. Kl. 18 Møti v/ Victor og Mirijam Carlsen og Sofus Hansen.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Mánakvøldið kl. 20 Sjómanskvinnuringurin kemur saman
Týskvøldið kl. 20 Argjakórið venur. Kl. 20.30 Ungdómsmøti
Hóskvøldið kl. 20 Bibliutími Róm. 15, 4-9
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jan Johannesen, Miðvági

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mánakvøldið kl. 19 Juniormøti
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v/ Karl Michaelsen, Mark. 14, 43 - 72.
Mikukvøldið kl. 20 Felagskóri venur.
Hósdagin kl. 16 Venur gentukórið. Kl. 20 Ungdómsmøti v/ Agnar Falkvard Joensen.
Sunnudagin kl. 15 Jólaveitsla fyri tey yngru. Kl. 18 Jólaveitsla fyri tey eldru
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta.
Mikudagin kl. 17.15 Barnakórið venur.
Sunnudagin kl 15 Jólaveitsla hjá sunnudagsskúlanum.
www.gospel.fo

**Filadelfia Tórshavn**
Mánadagin kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Bønarskúlin
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 Delli
Hóskvøldið kl. 20 Húsbólkar
Fríggjadagin kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Mammur hittast til bøn
Leygarkvøldið kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 15 Jólaveitsla – øll eru vælkomin.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Marknagil Fjalsg. 2, Tórshavn**
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Herluf Heinesen. Evni: Útimissión fyrr og nú.
Týsdagur kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Mikudagur kl. 19 í KFUM: Ten-sing venur. Hetta er fyri ungdómin.
Hósdagur kl. í KFUK: 4. Grein eigur kvøldið.

**Fríkirkjan Oasan**
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Ebenezer**
Mánadag kl. 12.30-12.50 Andakt. Eitt stutt brot verður lisið úr Bíbliuni og síðani er frítt at biðja ella hava eina stilla stund saman við Harranum. Øll eru vælkomin til andaktina. Andaktin er í stovuni yvir av Stóra Sali. Kl. 20.30 Hugnaløta fyri yngri kvinnur.
Týsdag Kl. 17 Frítíðararbeiði. Á skránni er sangur, søga og ítriv. Øll børn 9 ár og eldri eru vælkomin.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og lærumøti. Øssur Andreasen tosar um evnið 'Gud Sonurin – Hvør er Hann?'
Hósdag kl. 15.45-16.45 Sangevnjing – Gentukórið Kassia. Kl. 20 Ungdómsmøti. Jógvan Zachariassen tosar um kærleika.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Rólant í Skorini talar um evnið 'Gud Sonurin – Lív Jesusar'. Barnaansing er í Lítla Sali. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelikst møti. Barnaansing er í Stóra Sali
www.ebenezer.fo

**Hebron**
Týsdagur kl. 19 squash, bíbliuløta fyri ung 5.-8. flokk. Drekka verður at fáa aftaná.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/ Sigmund Andreasen sum talar og syngur.
Hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna**
Mánadagin kl. 16 Eldragudstænasta, Inga Poulsen Dam

**Kvívíkar kirkju**
Adventskonsert verður í Kvívíkar kirkju 1. des. kl. 19 Martin Joensen, Lív Næs og Hávardur Jensen syngja, aftaná verður kaffi
Kvívíkar Kirkja.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Týskvøldið verður bønarløta kl. 19.30 og bíbiltími kl. 20 v/ Emil Olsen. Øll eru vælkomin
Mikukvøldið verður juniorhugni kl. 19-20.30 fyri ung frá 5 klassa og uppeftir
Hjartaliga vælkomin

**Missiónshúsið Tabor, Toftir**
Barnaringurin hevur jólastovu í missiónshúsinum, mikudagin kl. 18.30. Marjan sigur frá ferð í Suður Afrika. Børnini syngja. Drekkamuður og burturlutan til frama fyri útimissión. Vit taka við tøkk ímóti lutum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hugnakvøld í Tabor á Toftum**
Týskvøldið kl. 19.30 verður eitt ament hugnakvøld, har Rannvá á Royðutoft sigur frá: "Tá maðurin og pápin er sjómaður" Kór við sjómanskonum syngur. Sjómanskvinnuringarnir í Rituvík, Runavík og í Søldafirði eru bodnir við. Øll eru vælkomin.

**Oyri/Norðskála**
Mikukvøldið kl. 19.30 verður eitt ament hugnakvøld í Blálolluni á Oyri. Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, sigur frá arbeiðinum hjá Sjómansmissiónini og vísur film frá sjólívinum. Øll eru vælkomin

**Lívsins Ord, Saltangará**
Mánakvøldið kl. 18 Tim 5
Mikukvøldið kl.19.30 Bønarmøti. Kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Hósdagin kl. 17.30 Liljur
Sunnudagin kl. 17 Møti
Øll hjartaliga vælkomin

**Meinigheitshúsið á Skála**
Mikukvøldið kl. 19 hevur sjómanskvinnuringurin hugnaløtu við burturluting. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík**
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/breyðbróting.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Týskvøldið kl. 20 verður bíbliutími og bønarløta.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mánakvøldið kl. 20 bønarløta
Týsdagin kl. 9.30 orðið á borðið.
Mikukvøldið kl. 19 árasøla. nógvir góðir vinningar.

**Missiónshúsið í Vági**
Týskvøld kl. 20 er bønarmøti

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag – hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Týsdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 10 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 11-13 Telduskeið Víðkað skeið (alnótin), Páll Poulsen.
Kl. 14-16 Telduskeið Víðkað skeið (myndir), Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Kl. 13-16 Jólasøla á vegghæddini.
Kl. 13-16 Livandi verkstaður av horn- og beinarbeiði verður í kjallaranum. Til ber at keypa sær eitthvørt, ið húsfólkini hava gjørt á verkstaðnum.
Mikudagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 9 Veving. Tilmelding: 316491. Joana Bjarnastein.
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru hjartaliga vælkomnir.
Kl. 13-16 Jólasøla á vegghæddini.
Kl. 13-16 Livandi verkstaður av horn- og beinarbeiði verður í kjallaranum. Til ber at keypa sær eitthvørt, ið húsfólkini hava gjørt á verkstaðnum
Hósdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið vegleiðing kl. 15-16 Arnhold Fjalstein.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Lesibólkurin. Øll, ið hava áhuga í bókmentum eru hjartaliga vælkomin.
Kl. 13-16 Jólasøla á vegghæddini
Kl. 13-16 Livandi verkstaður av horn- og beinarbeiði verður í kjallaranum. Til ber at keypa sær eitthvørt, ið húsfólkini hava gjørt á verkstaðnum.
Fríggjadag
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10-13 Matklubbur. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 13-16 Jólasøla á vegghæddini.
Kl. 13-16 Livandi verkstaður av horn- og beinarbeiði verður í kjallaranum.Til ber at keypa sær eitthvørt, ið húsfólkini hava gjørt á verkstaðnum.
Leygardagur
Kl. 10-14 Jólasøla á veghæddini *Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
Tlf. 222733
finnurj@post.olivant.fo
Mikudagin 1. des. kl. 18 hevur felagið bingo í Losjuni.

**Føroysk jólagudstænasta í Randers**
5. des. kl. 15 í Johanneskirken Vorup Boulevard 29.
Prestur við gudstænastuna er Jón Poulsen, prestur í Søhøjlandets Valgmenighed í Gjern. Aftaná verður høvi at senda jólaheilsur. Kaffi/te, smákøkur og annað "jólagott" til gánan. Gingið verður um jólatræið, og børnini fáa jólaposar. Dagurin endar við einum góðum føroyskum nátturabita við føroyskum viðskera. Øll eru vælkomin.

**Hugnaløturnar byrja aftur í Samuelskirkjuni Thorsgade 65, 2200 København N**
5. des. kl. 14 Guðstænasta. Kaffi í kryptini.
12. des. kl. 17 Konsert við Mpiri og hugnaløta og gløgg í kryptini.

**Blákrossbúðin, Kongagøta 10, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14
Bláí Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

**Blákrossbúðin, Heiðavegur 32, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 13-17:30 og leygardag frá kl 10-13.
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará. Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.*
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18. Øll eldri eru vælkomin*

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
*Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35 Klaksvík · tlf. 459091 dagtilhaldid@post.olivant.fo Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30 – 17.30*
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a. Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Vági**
Er opið týsdag og hósdag frá kl. 15-18. Øll eru vælomin.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
*Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í líkaviku frá kl. 15 til 18. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.*
Ogur møtast aftur í ólíka viku til somu tíð og sama stað.

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Sofíu Haraldsen, tlf. 332741 ella nevndarlimunum.

**BERIN – Sjálvhjálparbólkar**
fyri børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin.
info@berin.fo - www.berin.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun!
Teknað teg sum náttarravn ella gang ein royndartúr. Ring tlf. 212498 Daisy, 274696 Barbara, 224048 Óluf

**Spælistovan**
í Margarinufabrikkini. Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9-12 fyri børnum/ foreldrum uttan ansing.

**Vitjunarvinir**
Um tú vilt verða vitjunarvinur hjá Reyða Krossi ring ella skriva til okkum:
Reyði Krossur Føroya
Bryggjubakki 10
Postsmoga 1015
110 Tórshavn
Tlf. 319630
Redcross@redcross.fo
www.redcross.fo
Fyriskiparir í Tórhavn: Eyrith 313784 - 513784 og Marin 314333 - 284333.

**Giktafelag Føroya**
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
100 Tórshavn. Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13 til 16.

**Lymfødemfelagið**
Tlf. 225224
Íslandsvegur 10 C, Tórshavn
Postrúm 2113, FO-165 Argir

**Cøliaki Felag Føroyar**
*Formaður er Henning Sørensen, Garðsgøta 3, Argir, tlf. 314783. Postboks 3120, 110 Tórshavn, hjartafelag@hjartafelag.fo*

**Kvinnuhúsið**
Skrivstovan er opin gerandisdagar frá kl. 10-17. Tlf. 317200 svarar alt samdøgrið.
post@kvinnuhusid.fo
www.kvinnuhusid.fo

**Listasavnið á Sandi**
er stongt allan oktober mánaða, men letur upp aftur í november. Frá november til mai er bara opið sunnudag kl. 14-16. Bólkar o.o., sum vilja gera seravtalu um aðrar tíðir kunnu ringja á tlf. 211924 ella 361617 í góðari tíð frammanundan.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
MBF-Húsið - Íslandsvegur 10c
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld.

**Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum**
MBF Húsið Íslandsvegur 10c, FO-100 Tórshavn
hoyr@post.olivant.fo
www.hoyribrek.fo

**Krabbameinsfelagið**
Grønlandsvegur 58, Tórshavn
Telefontíð mánadag til fríggjadag frá kl. 13-15.
Tlf. 317959.